

*Hungur er eitt hvast svørð*

So hoyrdist aftur eitt enn størri brak og eitt buldur. Vit lupu á føtur at vita, hvat hetta var.

## Stóra træið koppaði

Har lá hetta stóra træið endalangt í túninum. Tað var brotnað av niðri við rótina. Tíbetur varð einki hús rakt. Vit fóru at hyggja at rótini og sóu, at brotið var heilt frískt.

Teir gomlu, sum vóru farnir heim, hoyrdu buldrið og komu saman við bygdarfólkinum at vita, hvat ið var hent. Tey undraðust stórliga.

Hetta settu øll í samband við boðskapin tey høvdu hoyrt. Tey hildu, at Gud nú hevði víst teimum, at hann var sterkari enn satan.

Tíðindini um træið fór út til allar bygdirnar. Ein streymur av fólki kom at síggja, hvat ið var hent, og at síggja træið, sum fólk høvdu tilbiðið í øldir, liggja í túninum.

Nógv fólk vóru komin til Garda, tí elsti maður í bygdini var deyður, og hesi fólkini komu í sorgarhús.

Um morgunin stóð eg uppi á rótini á trænum og talaði Guds orð fyri eini stórari mannamúgvu, sum var eini 3.000 fólk.

## Shamebo: Gentan líktist ikki menniskja men kom kortini fyri seg

Ein dagin spurdi tey: "Tá ið Gud kann fella hetta træið, kann hann so eisini lekja sjúk?" "Jú, tað kundi hann," var svarið. Tey søgdu mær nú frá ungari gentu, sum hevði verið sjúk í mong ár. Hon hevði ikki talað orð í langa tíð og fekst ikki at eta, tá ið fólk vóru hjá.

Vit fóru nú til smáttuna, har gentan lá. Smáttan var lítil og fátækslig. Eg ógvaðist við, tá ið eg sá gentuna liggja á moldgólvinum. Andlitið og allurin kroppurin vóru uppsvølpað, so hon líktist nærum ikki einum menniskja.

Eg fór inn í smáttuna. Eg tosaði við hana og las Guds orð fyri henni. Tá svaraði hon aftur og tosaði fyrstu ferð í langa tíð.

Vit bóðu fyri henni og løgdu hana í Guds hond. Síðan fóru vit við henni til klinikkina á missiónsstøðini í Gidole. Her fekk hon viðgerð í tveir mánaðir. Tá var hon fullkomiliga frísk bæði til likams og sálar. Hon gjørdist eisini kristin.

Fólk komu úr bygdunum til klinikkina bert fyri at síggja hana. Tey vóru stórliga bilsin at síggja hana ganga um fríska og ferðuga.

## Shamebo: Bjargaður av sólamyrking

Eg havi sitið í fangahúsi í Yrgalem og var fongslaður fyri Kristi skuld. Ein dagin var eg tikin til forhoyr i rættinum. Eg var spurdur um ymiskt í samband við mítt virki sum evangelistur. Teir speiróku meg og hildu meg fyri spott.

Alt í einum fór at skýma, hóast hetta var mitt á degi. Teir, sum forhoyrdu meg, vóru so skelkaðir, at teir sleptu mær leysum og róku meg eisini á dyr sum skjótast. Teir hildu hetta vera Guds dóm. Tá var hetta ein sólarmyrking, sum teir og heldur ikki eg vistu av!"

Hetta var frásøgnin hjá Shambero. Eg havi sjálv upplivað sólarmyrking uttan at hava vitað av henni frammanundan. Eg var tá sjúk í øðrum eyganum og gekk við bindi fyri tí. Meðan eg arbeiddi gjørdist myrkt fyri hinum eyganum, og eg var bangin fyri, at eg var við at blíva blind. Eg fór útum og fann útav, at hetta var sólarmyrking, sum fólk vóru komin nógva staðni frá, eisini útlandinum sum Amerika og Europa, at hyggja at. Sólarmyrkingin "sást" serliga væl á hesum leiðum.

## Trøllkonan Sui

Ein partur av søguni hjá Shamebo er eisini søgan um Sui. Eg kom at kenna hana, tá ið eg arbeiddi á sjúkrahúsinum í Gidole 1969-71. Hon var lág av vøkstri og hevði við framferð síni ein ávísan myndugleika við sær.

Hvønn morgun vóru andaktir hildnar uttanfyri klinikkina á sjúkrahúsinum. Millum onnur hevði Sui eisini andakt. Sui hevur góðar gávur. Hon dugur seks stammumál, og hetta ger hana sera væl fyri í hesum virkseminum. Fólk komu ymsa staðni frá, og tey tosaðu ymisk mál. So gekk hon runt og samtalaði við tey á teirra egna máli.



*Shamebo prædikar*

Sui hevði ikki altíð verið kristin. Hon er født umleið 1930 í Bore. Hetta er ein bygd, sum liggur um 3.000 metur omanfyri havið, einar 800 metur hægri uppi enn missiónsstøðin í Gidole.

Foreldur hennara og øll har um vegir vóru heidningar. Hon hevði frá barnaárum fylgt foreldrunum til satantænastur. Tey vóru sett av illum andum. Eisini tilbóðu og ofraðu tey til stokkar, steinar, trø, fossar, slangur og annað.

Hon var tískil á ungum árum trøllkona og í tænastu hins ónda, men kom til trúgv á Jesus fyri mongum árum síðani. Tað var júst Shamebo, sum fyrstur kom til bygdina haðani hon var ættað, at prædika Guds orð, og hann førdi hana til Jesus.

## Var kona nummar fýra

Fyrstu ferð, hon hoyrdi gleðiboðskapin, var hon gift við einum manni, sum hevði fýra konur. Hon var ikki noydd at gifta seg við honum. Hetta vildi hon sjálv. Hon vildi heldur giftast við einum vælhavandi manni enn at ganga allar sínar dagar og stríðast og strevast.

Tað var ikki við mildum orðum, at Sui tók ímóti Shamebo, tá ið hann kom at boða hendan nýggja boðskapin í Bore. Sui kendi, at her var komið nakað nýtt, sum henni ikki dámdi. Hon var ill og vildi ikki fara at lurta eftir Shamebo.

Hon bað hann sleppa sær burtur aftur. "Ert tú eitt konufólk," segði hon við hann.

"Hví arbeiðir tú ikki sum aðrir menn í staðin fyri at ganga runt og drekka kaffi?"

"Eg havi seks gudar, sum eg trúgvi á," segði Sui, "og maður mín hevur 63 gudar. Hvat er hetta fyri ein gudur, sum tú kemur og boðar okkum?"

Sui átti eitt lítið barn sum lá sera sjúkt á gólvinum. "Um so er, at tú eigur seks gudar og maður tín hevur 63, hví hava teir ikki hjálpt barninum hjá tær?" spurdi Shamebo.

Hóast hann fekk eina so óblíða móttøku, gavst Shamebo ikki at vitja Bore.

Sum frá leið gjørdist hon eitt sindur forvitin. Loyniliga nærkaðist hon plássinum, har fólkið lurtaði eftir Shamebo. Úrslitið varð eisini, at hon gjørdist gripin av orðinum og bleiv ein kristin.

## Vrakaði allar sínar gudar

Tískil vrakaði Sui allar sínar gudar og fór at trúgva á Jesus. Nakrar dagar seinni doyði barnið. Sui gjørdi tá framvegis, sum heidningarnir vóru vanir. Hon stroyddi mold í hárið og smurdi runu um alt andlitið. Tá ið Shamebo sá hetta, segði hann við Sui: "Hvat er hetta tú gert? Hetta er jú siður hjá heidningum, og tú sigur teg at vera kristna." Síðan rættir hann henni sápu og biður hana fara oman í ánna at vaska hetta av sær, og tað gjørdi hon so.

Hon fór heim í heimbygd sína og fór at vitna fyri manni sínum og hinum sum vóru har. Men tey slerdu bert alt uppí glens.

Tað bleiv ov mikið fyri hana framvegis at liva uppi í heiðinskapinum, har djevladyrkan fór fram. Hon fór tískil heim til mammu sína í Bore.

Hon gekk tá við barni undir belti. Hon fekk eina gentu, sum gjørdist sjúk. Tá komu fólk til hennara og søgdu, at nú mátti hon ofra til Satan og gomlu gudarnar, so at barnið kundi gerast frískt aftur. Hesum noktaði hon sjálvsagt fyri.

"Um tú ikki gert, sum vit siga, og barnið doyr, so skal tú sleppa at jarða tað sjálv", søgdu tey. Hetta var ein verulig hóttan. Tað var ein vanæra um bygdarfólki ikki vildi hjálpa til við eini jarðarferð. Men tað helt Sui, at trúboðararnir fóru at hjálpa henni við, um tað skuldi enda so. Gentan gjørdist tó frísk aftur. Sui átti fleiri børn, sum doyðu sum smá. Hendan genta vaks tó upp og gjørdist sjúkrasystir.

Ein beiggi Sui var blivin kristin áðrenn hon. Síðan eru bæði mamman og øll systkini blivin kristin og eru blivin evangelistar. Sui hevur eisini verið framúr íðin í tænastuni at bera gleðiboðskapin út til bygdirnar á Gidole leiðini.

## Hitti fyrrverandi trølkonuna aftur

Jorunn Hamre, norskur trúboðari, hevur verið í Etiopia í nærum 50 ár. Hon er har enn eysturi í landinum, 77 ára gomul. Hon var eitt skifti í Gidole. Hon og Sui abeiddu væl saman. Tær hava mangan verið úti í bygdunum fleiri dagar í senn og havt bíbliuskeið fyri kvinnunum.

Fyri nøkrum árum síðani var Sui eina ferð í Noregi. Hon hevði møtir ymsa staðni, og Jorunn tulkaði hana. Í Noregi man Sui hava verið í skóm. Annars dámdi henni best at ganga berføtt. Jorunn hevur eisini skrivað eina áhugaverda bók um Sui.

Fyri einum ári síðani flutti Sui frá Bore. Hon býr nú um ein kilometur niðanfyri missiónsstøðini. Har bygdi hon sær eina snotiliga smáttu. Staðið, har smáttan stendur, var fyrr nýtt til satandyrkan. Hon segði frá, at tá ið fólkini har rundan um frættu, at hon ætlaði at byggja á hesum staði, vóru tey skelkað og ráddu henni frá at gera tað, tí har búðu illir andar. Men ikki bilaði!

Sjálv havi eg ofta verið uppi í Bore, har Sui búði, har eg havi vitjað hana, tá ið eg havi haft kvinnumøti har.